# Føroyingar lokkast heimaftur

Hesi næstu árini skal fráflytingin úr Føroyum vendast til tilflyting, hvur Sambandsflokkurin sett sær fyri. Fyrst og fremst skulu føroyingar fáast at støðast betri í Føroyum, eins og arbeiðsmegin skal hava best møguligu sømdir. Flokkurin staðfestir, at hóast búskaparligan vøkstur og trot á arbeiðsmegi, er fráflytingin úr Føroyum ikki vend til tilflyting. Tí heldur hann, at tað er neyðugt at kanna orsøkina til hetta og so at rætta teir skeivleikar. Í hesum sambandi ætlar flokkurin at tryggja, at vinnan fær tað arbeiðsmegina henni tørvar og tí skal latast upp fyri útlendskari arbeiðsmegi á ein skipaðan hátt. Men føroyingar skulu fáast heim aftur eftir lokna útbúgving og somuleiðis skulu føroyskir granskarar fáast heim úr útlondum.

# Jólakonsert á Skála

Sunnudagin 2. desembur klokkan 17.00, verður hugnalig jólakonsert í ítróttarhøllini á Skála. Á skránni verður solosangur við vælkendu Magna Christiansen og Lisu Fredriksberg, men tey fara eisini at syngja onkran sang saman. Men tað verður eisini kórsangur við Vox og barnakórinum á Skála. Vit fara eisini at hoyra nývalda bispin, Jógvan Fríðriksson hugleiða um ymisk viðurskifti. Í steðginum fæst kaffi og kaka til keyps frá jólakonum á Skála og at enda fer barnakórið at ganga lusiugongd, og síðan verður onkur felagssangur. Atgongumerkini kosta 150 krónur og tey fáast í Statoil og hjá Eivind á Strondum, hjá Bakaranum og hjá P.E á Skála, hjá Statoil í Skálabotni í Kiosk Vár í Saltangará, hjá Shell við Streymin og hjá P.W. í Norðagøtu. Men leypa nøkur av, verða tey seld við dyrnar.

# mest

og 14-15 prosent. Altso ikki nakar avgerandi munur. Sambandsflokkurin hevur kanska eitt sindur verri vónir enn Fólkaflokkurin og Javnaðarflokkurin í stríðnum um annaðplássið, tá ið vit hyggja at hesum partinum av veljarunum.

### Hvør fær frá hvørjum?

Her er tað serliga spurningurin, um at halda fast um teir marginalveljarar, ið eru komnir frá øðrum flokkum. Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin hava fingið eini 6-7 prosent úr øðrum flokkum. Fólkaflokkurin serliga frá Sambandsflokkinum, Sambandsflokkurin serliga frá Fólkaflokkinum og Javnaðarflokkinum. Tjóðveldi tekur eini 5 prosent, serliga frá Javnaðarflokkinum og partvíst frá Sambandsflokkinum. Tann, sum er komin ringast burtur úr hesari kappingini, er Javnaðarflokkurin, ið bert hevur megnað at fáa eini 2 prosent frá øðrum flokkum.

### Spennandi Miðflokkur

Tann mest áhugaverdi flokkurin er kortini ikki nakar av teimum stóru flokkunum, men Miðflokkurin, ið gongur mest fram síðani seinasta fólkatingsval. Hann tekur heili 54 prosent úr øðrum flokkum, serliga úr Tjóðveldisflokkinum, ið stendur fyri úti við helvtini av hesum, men annars frá Sambandsflokkinum og Fólkaflokkinum.

### Tey, ið velja fyrstu ferð

Millum teirra, ið hava høvi at velja fyrstu ferð, stendur Tjóðveldi seg frægast við umleið 28 prosentum. Sambandsflokkurin næstur við 22, meðan Fólkaflokkurin og Javnaðarflokkurin fáa eini 17 prosent í part. Aftur her er Miðflokkurin mest áhugaverdur við 6 prosentum, tí her eru veljarar, ið kunnu hugsast at vilja brúka atkvøðuna til at hava ávirkan á, hvør verður valdur. Tað sama ger seg galdandi, tá ið vit hyggja at teimum, ið ikki vóru á vali seinast, men ætla sær at atkvøða hesaferð. Her hevur Miðflokkurin umleið 9 prosent.

### Gummiarmurin

So tað verður tann víða gitni gummiarmurin, ið kann koma at broyta myndina frá veljarakanningini. Vilja veljarar, ið hava leitað sær til Tjóðveldið frá øðrum flokkum, leita aftur til tann kroysta flokkin, tey komu úr. Tjóðveldið tykist trygt, so tað er væl hugsandi, at summi velja at brúka atkvøðuna at vera við at avgera, hvør av hinum trimum stóru flokkunum skal fáa umboð á fólkatingi. Tjóðveldið hevur serliga fingið atkvøður frá Javnaðarflokkinum, so her hevur flokkurin hjá løgmanni kanska ein møguleika.

Men tað verða serliga veljararnir hjá Miðflokkinum, ið verða áhugaverdir. Nógvir koma úr øðrum flokkum, serliga Tjóðveldinum, men eisini úr Fólkaflokkinum og Sambandsflokkinum. So hesir flokkar kunnu hava eina serliga vón um, at veljarar hjá Miðflokkinum vilja koma teimum til hjálpar í endaspurtinum. Og so eru tað teir mongu veljararnir, ið ikki vóru á vali seinast, ið hava hug á Miðflokkinum, men sum kunnu hugsast møguliga at brúka atkvøðuna, so tey kunnu avgera, hvør skal á Fólkating.




*Myndin vísir, hvussu lutfalsliga býtið í kanningini er í mun til kyn og tey, ið vildu atkvøtt listan.*

# Kvinnurnar taparar

**Átøkini fyri at fáa fleiri kvinnur valdar eru fullkomiliga miseydnað. Síðsta fólkatingsval fingu kvinnuligu valevnini 16,6 prosent, meðan kvinnurnar bert fáa 12,4 prosent av atkvøðunum hesaferð. Hetta vísir veljarakanningin, sum Fynd gjørdi fyri Sosialin**

VELJARAKANNING
*Karin Jóhanna L. Knudsen, samfelagsfrøðingur*

Í veljarakanningini vórðu fólk spurd, um tey høvdu gjørt av at atkvøða persónliga ella uppá listan. Og um tey ætlaðu at atkvøða fyri einum persóni, hvønn tey so fóru at velja. Sostatt vórðu tey ikki spurd um tey fóru at velja eina kvinnu ella mann.

Av teimum, ið ætlaðu sær at atkvøða fyri einum persóni, høvdu 2/3 av kvinnunum og 1/3 av monnunum at atkvøtt fyri einum kvinnuligum valevni. Myndin niðanfyri vísir, hvussu lutfalsliga býtið í kanningini er í mun til kyn og tey, ið vildu atkvøtt listan.

Sum sæst á myndini, eru flest javnaðarveljarar, ið siga seg vilja atkvøða fyri einum kvinnuligum valevni og fæst miðflokkaveljarar – ávikavist 27,9 prosent og 0 prosent.

Samanbera vit úrslitini frá kanningini við fólkatingsvalið í 2005, sæst at tað eru ikki stórvegis broytingar í mun til, hvussu stórur partur av atkvøðunum fara til kvinnulig valevni. Á fólkatingsvalinum í 2005 fingu kvinnuligu valevnini 16,6 prosent av atkvøðunum. Í kanningini siga 12,4 prosent av teimum spurdu seg ætla at atkvøða fyri einum kvinnuligum valevni. Kanningin bendir sostatt á, at tey átøk, ið hava verið fyri at økja um kvinnuligu umboðanina ikki hava havt stórvegis ávirkan á veljaran. Við í kanningini vóru 558 fólk. Av teimum vóru 49% konur og 51% menn.